# akar dunnuhylin






skal koma og forstýra. Tá donsk fjølmiðlafólk so komu í løgtingið at fylgja við avgerandi atkvøðugreiðsluni, vórðu tey av talarastólinum enntá biðin um at skrubba av til sítt kriminella heimland!

Men har hjálpti ongin politisk happing av talarastólinum. Júst av altjóða trýstinum samtykti ein meiriluti í tinginum lógarbroytingina. Teir tríggir sambandsmenninir, sum hálsaðu um og atkvøddu fyri, eru allir internationalistar, sum vita, at skalt tú spæla við millum onnur lond, mást tú fylgja altjóða ásetingum um so mangt, eisini diskriminering av fólki.

## Veðurlag og ábyrgd

Her hava vit so fleiri dømir um, hvussu vit vakna, tá umheimurin trýstir okkum. Tá fáa málini avleiðingar. Í hesum seinasta málinum vóru avleiðingarnar so ógvusligar, at summir løgtingsmenn antin heilt ella lutvíst kvettu við sínar flokkar og avdúkaðu, at teir fyrst og fremst vóru valdir av átrúnaðarligum orsøkum. Tað var so, hvat tað var.

Men tað besta var, at okkurt endiliga fekk avleiðingar.

Eisini í kjakinum um veðurlagsbroytingar hava vit sæð, at lítið skal til fyri at flyta føroyskar politikarar langt eftir stuttari tíð. Nógvir teirra hava ikki viljað hoyrt talan um grønar skattir og umhvørvisavgjøld, tí tað fór at verða steinur oman á byrði hjá vinnuni, søgdu teir. So segði ST í eini stórari frágreiðing, at veðurlagsbroytingarnar við vissu eru mannaskaptar, og altjóða virðislønarvinnarin, Bogi Hansen, kallaði politikararnar fyri klovnar, tí teir onki vildu gera.

Nú kom brádliga vend í. Tveir borgarligir landsstýrismenn fóru alment at tosa um at leggja grønar skattir og umhvørvisavgjøld á virksemi, sum er orsøk til veðurlagsbroytingarnar. Kyoto-samtyktin var brádliga heilt ok. Tað, sum hendi, var, at landsstýrismenninir við umheiminum sum spegili sóu, hvørja ábyrgd teir áttu at taka heima hjá sær sjálvum. Men teir sóu hetta bara, tí ST og ein føroyingur við altjóða viðurkenning skumpaðu undir teir.

Øll hesi málini vísa, at vón avgjørt er fyri føroyskum politikki. Hann kann væl gerast konsekventari, perspektivríkari og meira viðkomandi enn hesin provinsielli pseudoleikurin, ið vit so mangan eru vitni til. Men til tess krevst, at vit fara at føra politikk við ábyrgd mótvegis restini av verðini. Føroyskur politikkur má fáa eina uttanríkispolitiska dimensión.

